STUTT SAGT

## Hvítusunnuvinir hittast til stevnu

**Vestmanna:** Limirnir í samkomuni Saron munnu vera millum tey, ið gleða seg allarmest til hesa hvítusunnununa.

Henda hvítusunnusamkoman hevur nevniliga átikið sær at skipa fyri árligu stevnuni, sum verður hildin í ítróttarhøllini í Vestmanna um vikuskiftið.

Møtini byrja við stórari konsert í annaðkvøld kl. 21, har tríggir bólkar fara at luttaka: Petur Háberg Band, Direct Level og Heini Lutzen.

Tað verða tó ikki bert møtir á skránni. Leygarmorgunin hevur nevniliga Lív Jacobsen tikið stig til eitt skeið fyri øll tey, sum luttaka í barnaarbeiði í samkomunum.

Vónað verður her, at fólk úr samkomunum kring landið kunnu koma saman at tosa um hetta týdningarmesta arbeiðið og geva hvørjum øðrum íblástur. Ætlanin er eisini at hava møtir fyri børnum í fimleikarhøllini. Hesi verða hildin samstundis sum møtini í høllini verða.

Møtini verða tó ikki bert hildin inni í høllini, tí leygardagin kl. 15 er ætlanin at hava eitt útimøti á Torginum í Vestmanna.

Leygarkvøldið kl. 18 verður eisini eitt serstakt kvøld í høllini, tá orðið "surprise" fer at verða havt á lofti rættiliga ofta. So mikið verður kortini avdúkað, at kvøldið er eitt "must" fyri tey ið dáma Gaither-tónleik og motorsúkklur. Ein kendur norðurlendskur gospelsangari fer eisini at luttaka. Seinni sama kvøld er gospelkonsert á skránni, og kvøldið eftir ein lovsangskonsert, har bæði bólkar og solistar fara at luttaka.

Annars halda møtini fram báðar hvítusunnudagarnar kl. 11 og 18. Útimøti verða somuleiðis kl. 15 báðar dagarnar.

Heitið fyri hesi møtini er "Hvítusunna tá?/Nú?". Sagt verður, at møtini eru bæði fyri børn, ung og eldri.

**sb.**



*Hvítusunnustevna verður í Vestmanna um høgtíðina hetta vikuskiftið*

## Luttøka úr øllum landinum

**Kollafjørður:** Eisini kollfirðingar og fólk í nánd av Kollafirði sleppa á hvítusunnustevnu í ár.

Stevnan í skúlanum í Kollafirði byrjar við bønamøti í kvøld, men verður sett í annaðkvøld av sóknarprestinum í økinum, Mogens T. Christensen. Við hetta møtið syngja Irena og Sonja.

Síðani heldur stevnan fram alla høgtíðina við møtum hvørt kvøld. Aftaná hvørt møti verður boðið til eina sang- og vitniløtu í missiónshúsinum, ið liggur beint við skúlan.

Talarar og sangkreftir koma úr øllum landinum.

**sb.**

## Nógv møtir

Umframt hesi nevndu tiltøkini á hvítusunnu verða hópin av øðrum tiltøkum á hvítusunnu.

Í fleiri samkomum verða møtir hildin hesar dagarnar. Til ber at kunna seg nærri um hesi tiltøkini undir "Tiltøk" í blaðnum í dag.

**sb.**

# Vónin um at hoyra nakað gott



**Sum ein av fáum fyritøkum í Føroyum hava starvsfólkini á trolvirkinum Vónin í Fuglafirði møguleika at hoyra Guds orð - í arbeiðstíðini!**
**– Eg haldi, at fólk eru sera positiv til hetta, sigur Jógvan S. Jacobsen sum er ein teirra, sum hevur hesar andaktirnar.**

ANDAKTIR

*Orð/mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Á einum trolvirki sum Vónin í Fuglafirði er altíð úr at gera hjá starvsfólkunum. Kortini er neyðugt at hava steðgir av og á.

Ein av hesum steðgum er løtan fyrrapart, tá kaffi er á skránni. Her hittast tey øll til eitt gott prát allar dagar í viku.

Fríggjadag er kortini ein serstøk løta, tí eftir kaffisteðgin hevur fólkið møguleika at verða við til eina andakt í matstovuni.

Tað eru starvfólkini sum sjálvi hava tikið stig til hetta og sum skiftast um at bera Guds orð fram. Og líkt er til, at fólk eru fegin um hetta.

– Hetta við tí andaliga lívinum er ein partur av mínum gerandisdegi. Eg havi tí gott av at hoyra tað her á arbeiðsplássi mínum.

– Og eg veit, at mong av hinum starvsfólkunum siga tað sama, sigur fuglfirðingurin, Jógvan S. Jacobsen, ið er innkeypari á Vónini.

Hann hevur sjálvur fleiri av hesum andaktum, saman við fólkum úr øðrum samkomum.

### Gott kaffiprát

Hetta við andaktunum á Vónini er ikki nýtt tiltak. Tað munnu vera eini 6-7 ár síðani at farið varð undir at hava regluligar andaktir í kaffisteðginum fríggjadagar.

Hugskotið til hetta spratt fram í samtaluni millum fleiri av starvsfólkunum á fyritøkuni: – Hevði tað ikki verið eitt gott hugskot at havt regluligar andaktir í arbeiðstíðini?!

– Onkur helt fyri, at ein tosaði um so mong ymisk viðurskifti í einum slíkum kaffisteðgi. So, hví ikki tosa eitt sindur um tey andaligu tingini?!

– Tá stjórin varð spurdur um hetta, var hann beinanvegin við uppá tað. Og soleiðis bar tað til at vit fingu andaktirnar í lag, og at tær framvegis verða hildnar, sigur Jógvan S. Jacobsen.

Nevndur varð møguleikin at hava tær í endanum av kaffisteðginum ein ávísan dag í vikuni, og tá hetta var greitt byrjaðu andaktirnar.

Í dag eru hesar andaktirnar vorðnar ein partur av dagsskránni á virkinum. Og undirtøkan hevur eisini verið framúr góð til andaktirnar.

### Eingin mótstøða

Tað er ikki heilt vanligt at hava slíkar andaktir á virkjum og í fyritøkum her á landi.

Ein natúrligur spurningur til Jógvan í hesum sambandi er tí, um hvørjar reaksjónir hann fekk frá fólkinum til hetta stigið:

Var nøkur mótstøða at hóma? Ella kanska yptir akslar?

– Nei, sigur Jógvan. – Her hevur eingin mótstøða verið!

– Her hevur einki øvugt orð verið sagt um hetta. Eg haldi, at teimum dámar tað væl, tí eg havi bara hoyrt gott um tað, sigur hann.

### Sama reiðarí

Hetta við andaktunum á Vónini er ikki nakað ein ynskir at krógva. Runt í fyritøkuni hanga nevniliga seðlar, sum siga frá degi og tíðspunkti fyri andaktunum.

Skipanin við andaktunum er hon, at kaffisteðgurin fríggjadag byrjar sum vanligt kl. 9:45.

Tá klokkan so gerst 10 fer tann, ið skal hava andaktina á føtur og bjóðar hinum vælkomnum, og so er andaktin í gongd.

Teir eru fleiri sum skiftast um at hava hesar andaktirnar. Teir koma úr ymiskum samkomum.

– Men hetta er ikki nøkur forðing, tí vit eru allir úr sama reiðarí'i!, sigur Jógvan brosandi.

# Hvítusunna – hvat er

Hvítusunna er ein kristin høgtíð, sum verður hildin til minnis um at Heilagi Andin kom yvir ápostlarnar.

Frásøgnina um hesa hending finna vit í Ápostlasøguni kapittul 2, og ørindini 1 til 13, og eru tey soljóðandi: "Og tá ið nú hvítusunnudagurin var komin, vóru teir allir saman komnir á einum staði. Og tá kom bráðliga eitt dun av himli, sum tá ið harðveður brestur á, og fylti alt húsið, sum teir sótu í. Og fyri teimum sýndust tungur líkasum av eldi, sum skildust sundur og settust á ein og hvønn teirra; og teir vórðu allir fyltir av hinum heilaga anda og tóku at tala á øðrum tungumálum eins og andin gav teimum at mæla. Men har vóru Jødar búsettir í Jerúsalem, menn, ið óttaðust Guð, av øllum tjóðum undir himni. Tá ið nú hetta ljóðið hoyrdist, kom mannamúgvan saman, og henni varð dátt við; tí at teir hoyrdu, ein og hvør, teir tala á sínum egna máli. Og teir vórðu allir bilsnir og undraðust og søgdu: »Sí, eru ikki allir hesir, ið tala, Galileumenn? Hvussu ber tað tá til, at vit, ein og hvør, hoyra teir tala á okkara egna máli, sum vit eru føddir við? Partar og Medar og Elamitar og vit, sum eru búsettir í Mesopotámiu, Júdeu, Kappadókíu, Pontus og Ásiu, í Frýgíu og Pamfýliu, Egyptalandi og Libyubygdunum við Kýrene, og vit Rómverjar, sum her hava setst niður, Jødar og proselýtar; Kretoyingar og Árábar, vit hoyra teir tala á okkara tungum um stórverk Guðs?« Men teir gjørdust allir bilsnir og vóru í døpurhuga og søgdu hvør við annan: »Hvat man hetta